# SIGNAR Í PRIXNUM



– Hesi árini Prix Føroyar hevur verið, eru tað skrivaðir ein rúgva av nýggjum sangum, tí kravið í kappingini hevur verið, at bólkarnir spæla nýtt tilfar. Tí hevur Prixið verið ein drívmegi í føroyskum tónleiki hesi árini, sigur Signar í Homrum, sangari í bólkinum Rok.

Mynd: Jens Kr. Vang

**Signar í Homrum fer nú at royna seg aftur í Prix Føroyum. Tvær ferðir í 90'unum endaðu hann og hinir í Kjølum næstfremst í kappingini, men nú er hann sangari í bólkinum Rok**

ROK

*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

Í nógv ár var hann oddamaður í einum tí best umtókta rockbólkinum í landinum – Kjølum. Men so fór hann av landinum, og í drúgva tíð var tónleikalig tøgn. Nú er hann aftur klárur at trína á Prix-pallin, og tað verður við einum nýggjum bólki.

Kollfirðingurin Signar í Homrum ger Prix-comeback, og tað gleðir hann seg til.

– Tað er fyrst og fremst til stuttleika, at vit eru við í kappingini. Vit hava spælt saman í eina tíð og høvdu hug at fara við til Prix Føroyar, sigur Signar í Homrum.

– Prix Føroyar er ein stór og spennandi kapping, og áhugin fyri henni er stórur. Tað gevur nógva umtalu at verða við, og tú kanst fáa bólkin fram gjøgnum kappingina.

Bólkurin er Rok, og teir hava spælt til dans kring Føroyar í eina tíð. Bólkurin hevur tó einki givið út, og teir hava fyrst og fremst spælt coversangir.

– Prix Føroyar krevur av bólkunum, at teir spæla nýggjar sangir, og tað hevur eisini fingið okkum at venja nýtt tilfar. Tað er takknemligt at spæla coversangir, men tað gongur ikki í Prixnum. Vit hava spælt eitt sindur av tí, sum eg áður havi skrivað, men nú hava vit skrivað nýggjar sangir, sigur Signar í Homrum.

## Prixið gevur eitt skump

Hóast bólkurin Rok er rímiliga ungur, so eru fleiri skiftingar gjørdar í manningini, og nú eru bara tveir av teimum upprunaligu limunum eftir. Teir fýra tónleikararnir í bólkinum eru Signar í Homrum, Johan Ziskason, John Johansen og Ólavur Enni Elisson.

Johan Ziskason hevur áður spælt í bólkinum Mark No Limits, sum vann Prix Føroyar á sinni, og John Johansen hevur tikið lut við fleiri bólkum úr Vágum áður.

– Tað góða við Prixnum er, at tað gevur bólkinum eitt skump. Venjingarnar verða betur, og tað kemur meira burtur úr, sigur Signar í Homrum.

– Hesi árini Prix Føroyar hevur verið, eru tað skrivaðir ein rúgva av nýggjum sangum, tí kravið í kappingini hevur verið, at bólkarnir spæla nýtt tilfar. Tí hevur Prixið verið ein drívmegi í føroyskum tónleiki hesi árini.

## Eisini ein sosialur partur

Signar í Homrum fjalir ikki út yvir, at Prix Føroyar er eisini ein gyltur møguleiki at hitta tónleikarar.

– Vanliga spæla vit í hvør sínum staði í landinum, men her er ein møguleiki at hitta aðrar tónleikarar og bólkar. Og tað er næsta so-leiðis, at tað er stuttligast at vera backstage til Prix Føroyar, sigur Signar í Homrum.

– Hóast talan er um eina kapping, so er stemningurin góður millum tónleikararnar. Eingin leggur fót fyri nakran, og kappingin órógvar ikki tað góða lagið. Tí skulu vit ikki gloyma tað sosiala elementið í Prix Føroyum, sigur hann.

## Skrivar enn tónleik

Signar í Homrum var við til at skriva tónleikin hjá Kjølum, og millum teir kendu sangirnar, hann hevur skrivað, teljast Paying og Skýmandi Kvøldið, sum framvegis javnan er at hoyra í útvarpi, hóast sangurin hevur nógv ár á baki.

– Tað, sum eg skrivi nú, líkist mær sjálvum, men tónleikurin blívur øðrvísi av, at aðrir tónleikarar spæla. Johan er ikki tann sami gittarspælarin sum Jens Marni, og John er ikki tann sami bassisturin sum Jens Tummas. Tað førir beinanvegin tónleikin aðrar leiðir, sigur Signar í Homrum.

Og leygarkvøldið skulu nýggir sangir, sum Signar hevur verið við til at skriva, standa sína roynd í Prix Føroyum.

## KJØLAR ERU VIÐ

Teir fýra tónleikararnir í bólkin Kjølar, sum bæði í 1997 og 1999 endaði sum nummar 2 í Prix Føroyum, eru allir við í Prixnum í ár, men teir taka lut við trimum ymiskum bólkum.

Sangarin Signar í Homrum er nú sangari í bólkinum Rok, og teir eru við leygarkvøldið.

Trummuspælarin Henning Nicodemussen og basspælarin Jens Tummas Næss spæla í bólkinum All That Rain, sum loysti Kjølar av á sinni.

Seinasti tónleikarin, gittarspælarin Jens Marni Hansen, hevur spælt bæði í Kjølum og All That Rain, men hesaferð er hann ein av tónleikarunum há Eyðuni Nolsøe, sum er við í kappingin leygarkvøldið.

## NÓGVIR VINNINGAR

- Høvuðsvinningurin til Prix Føroyar 2005 er ein vika í danska Lundgaard Studios. Mentamálaráðið og Atlantic Airways lata vinningin.
- Listastevna Føroya - august 2006 - bjóðar vinnaranum av Prix Føroyar kappingini at spæla á Listastevnuni 2006.
- Jelling Musikfestival saman við Atlantic Airways - mai 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- NIBE-Festival saman við Atlantic Airways - juni 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- Ólavsøkukonsertin 2005 - Vinnarin og ein bólkur frá hálvfinaluni í Suðuroynni verða tveir av bólkunum á Ólavsøkukonsertini.
- G-Festivalurin - velur fyrst ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein Prix-bólk frá Atlantic Music Event.
- Musikhuset VEGA í Keypmannahavn bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í VEGA í 2005.
- Summarfestivalurin 2005 - velur ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein bólk frá Atlantic Music Event.
- Nipiaa Rockfestival í Aasiaat í Grønlandi - august 2005 - bjóðar í minsta lagi einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla á rockfestivalinum 2005.
- AIRWAVES í Íslandi - oktober 2005. Møguleiki verður latin upp fyri at fáa føroyskar bólkar at spæla á Airwaves 2005.
- »Peace & Love Festivalurin« í Svøríki bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í Svøríki summarið í 2005.